# Løgmansskrivstovan

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 13.12.2021 |
| Mál nr.: | 21/24059 |
| Málsviðgjørt: | NF |
| Ummælistíð: | 13.12.21-<br>10.01.2022 |
| Eftirkannað: | |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í ymsum løgtingslógum o.tíl. í samband við umskipan av Føroya Kærustovni**
(Avtøka av kærunevndini í lendismálum, Vinnukærunevndini og Skuldarumskipanarnevndini)

*Lendismál*

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 60 frá 15. mai 2012 um at byggja bygningar o.a. (Byggilógin), verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 19, stk. 2 verður "Kærunevndina í lendismálum" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**2.** Í § 19, stk. 4 verður "Kærunevndin í lendismálum" broytt til: "Føroya Kærustovnur".

**3.** Í § 19, stk. 5 verður "Kærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 2**

Í løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 26. mai 1988, løgtingslóg nr. 55 frá 25. mai 2009 og løgtingslóg nr. 12 frá 11. februar 2013, verður § 11 orðað soleiðis:

"**§ 11.** Avgerðir sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina."

**§ 3**

Í løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m., sum broytt við § 2 í løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006 og løgtingslóg nr. 82 frá 25. mai 2009 verður § 39 a orðað soleiðis:

"**§ 39. a.** Avgerðir sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina."

**§ 4**

Í løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 1. mai 1973, løgtingslóg nr. 37 frá 29. mai 1985, løgtingslóg nr. 39 frá 5. mai 1987, løgtingslóg nr. 59 frá 10. mai 2000, løgtingslóg nr. 164 frá 22. desember 2005, § 3 løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006, § 1 í løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009 og løgtingslóg nr. 70 frá 15. mai 2014, verður § 36 orðað soleiðis:

"**§ 36.** Avgerðir, sum kommuna hevur tikið sambært hesi løgtingslóg ella sambært byggisamtykt, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina."

**§ 5**

Í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 24. mai 1974, løgtingslóg nr. 59 frá 5. juni 1984, løgtingslóg nr. 80 frá 13. juni 1995, løgtingslóg nr. 57 frá 13. juni 1997, § 1 í løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006, løgtingslóg nr. 32 frá 30. apríl 2007, løgingslóg nr. 81 frá 25. mai 2009 og løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013, verður § 10 a orðað soleiðis:

"**§ 10 a.** Avgerðir Tinglýsingarstovunnar sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina."

**§ 6**

Í Lov nr. 69 af 7. maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne, sum broytt við midlertidig bestemmelse nr. 45 frá 30. oktober 1941, midlertidig bestemmelse nr. 17 frá 20. januar 1944 og § 4 í løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006, verður § 8 orðað soleiðis:

"**§ 8.** Avgerðir sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina."

*Vinnumál*

**§ 7**

Í løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2020 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin), verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 43, stk. 3, 7. pkt. verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn", og "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni".

**2.** Í § 50, stk. 3, 7. pkt. verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn", og "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni".

**3.** Í § 57 verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 8**

Í løgtingslóg nr. 49 frá 30. apríl 2018 um djóravælferð (Djóravælferðarlógin), sum broytt við § 77 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 27 orðað soleiðis:

"**§ 27.** Avgerðir hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, tiknar við heimild í hesi løgtingslóg ella reglum, givnar við heimild i hesi løgtingslóg, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina."

**§ 9**

Í løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2015 um fjarskifti (Fjarskiftislógin), sum broytt við

§ 72 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 25, stk. 1, 1. pkt. verður "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni".

**2.** Í § 47, stk. 3 og 4 verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**3.** Í § 67, stk. 1 verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**4.** Í § 68, 1. pkt. verður "Vinnukærunevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur".

**5.** § 71 verður orðað soleiðis:

"**§ 71.** Føroya Kærustovnur tekur avgerð í málum, sum eftir løgtingslógini ella reglum, ásettar við heimild í løgtingslógini, eru lagdar til Føroya Kærustovn.
*Stk. 2.* Avgerðir hjá Fjarskiftiseftirlitinum kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina."

**§ 10**

Í løgtingslóg nr. 21 frá 16. mars 2012 um havnaloðsing (Loðslógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 143 frá 18. desember 2013, løgtingslóg nr. 65 frá 29. mai 2017, løgtingslóg nr. 63 frá 9. mai 2019 og § 68 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 18 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 11**

Í løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016, § 1 í løgtingslóg nr. 44 frá 26. apríl 2019, § 1 í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019 og løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021, verður í § 322, stk.1 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 12**

Í løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (Grannskoðaralógin), sum broytt við § 4 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 28 frá 26. mars 2012, løgtingslóg nr. 76 frá 22. mai 2015 og løgtingslóg nr. 51 frá 4. mai 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 44 a, stk. 5 verður "Vinnukærunevndina" tvær staðni broytt til: "Føroya Kærustovn".

**2.** Í § 48, stk. 1 verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 13**

Í løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 um aling av fiski v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 14. desember 2012, løgtingslóg nr. 50 frá 30. apríl 2018 og løgtingslóg nr. 65 frá 14. mai 2020, verður í § 24 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 14**

Í løgtingslóg nr. 20 frá 8. mai 2008 um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum verður í § 5 "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni".

**§ 15**

Í løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum broytt við løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 137 frá 20. desember 2012, løgtingslóg nr. 53 frá 12. mai 2015,

løgtingslóg nr. 65 frá 30. apríl 2018, løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, § 67 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og løgtingslóg nr. 43 frá 22. apríl 2021, verður í § 214, stk. 1 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 16**

Í løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 2007 um spreingievni og spreingiarbeiði v.m., sum broytt við § 62 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 19 orðað soleiðis:

"**§ 19.** Avgerðir sum Arbeiðseftirlitið hevur tikið sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Kæra er steðgandi, til Føroya Kærustovnur hevur tikið avgerð í málinum."

**§ 17**

Í løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping, sum broytt við § 7 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008 og løgtingslóg nr. 35 frá 27. apríl 2012, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 19, stk. 2, nr. 5 verður "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni".

**2.** Í § 19, stk. 2, nr. 6 verður "Vinnukærunevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur".

**3.** Í § 21 verður "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni".

**4.** Í § 27, stk. 1 verður "Vinnukærunevndina í kappingarmálum" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**5.** Í § 27, stk. 3 verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**6.** Í § 27, stk. 4 og 5 verður "Vinnukærunevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur".

**7.** Í § 28, stk. 1 verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn" og "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni".

**8.** Í § 28, stk. 2, 1. pkt. verður "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovni" og í 2. pkt verður "Vinnukærunevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur".

**9.** Í § 28, stk. 3, 1. pkt. verður "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni" og í 2. pkt. verður "avgerð Vinnukærunevndarinnar" broytt til: "avgerðin hjá Føroya Kærustovni".

**10.** Í § 31 , stk. 1, nr. 11 verður "Vinnukærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni".

**11.** Í § 32, stk. 4, 2. pkt. verður "Vinnukærunevndina í kappingarmálum" broytt til: "Føroya Kærustovn". Skal § 32, stk. 4 strikast? Sannlíkt ikki viðkomandi longur?

**§ 18**

Í løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007 um kavaravinnu og kavaraútgerð, sum broytt við § 64 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 19 orðað soleiðis:

"**§ 19.** Avgerðir sum Arbeiðseftirlitið hevur tikið sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Kæra er steðgandi, til Føroya Kærustovnur hevur tikið avgerð í málinum."

**§ 19**

Í løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 20. november 2007, § 10 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012 og løgtingslóg nr. 184 frá 21. desember 2018, verður í § 18 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 20**

Í anordning nr. 1113 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde, sum broytt við § 4 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, § 4 í løgtingslóg nr. 52 frá 11. mai 2009, § 5 í løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, § 3 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, § 3 í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, og § 3 í løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021, verður í § 62, stk. 2 "Vinnukærunevndin" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 21**

Í anordning nr. 1114 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), sum broytt við § 3 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, § 3 í løgtingslóg nr. 52 frá 11. mai 2009, § 2 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 25 frá 16. mars 2012, løgtingslóg nr. 43 frá 6. mai 2016, § 3 í løgtingslóg nr. 44 frá 26. apríl 2019, § 2 í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019 og § 2 í løgtingslóg nr. 57 frá 4. mai 2021, verður í § 15 e , stk. 3 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 22**

Í løgtingslóg nr. 103 frá 20. november 2007 um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál verður í § 2, stk. 3 "eina kærunevnd" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 23**

Í anordning nr. 1355 af 9. desember 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven (Ársroknskaparlógin), sum broytt við § 5 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2009, § 1 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, § 1 í løgtingslóg nr. 136 frá 11. desember 2013, løgtingslóg nr. 50 frá 12. mai 2015 og løgtingslóg nr. 45 frá 6. mai 2016, verður í § 163 , stk. 1 "Vinnukærunevndin" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 24**

Í løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003 um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø., sum broytt við § 15 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verður í § 3, stk. 1, 1. pkt.,stk. 2, 2. pkt. og stk. 3 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 25**

Í løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001 um djórasjúkur, sum broytt við § 13 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 105 frá 13. juli 2017 og § 56 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður í § 46, stk. 1, stk. 2, 2. pkt. og stk. 3 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 26**

Í løgtingslóg nr. 64 frá 27. apríl 2001 um vinnu, sum broytt við § 1 í løgtingslóg nr. 55 frá 16. mai 2006, § 6 í løgtingslóg nr. 18 fra 8. mai 2008 og § 9 í løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, verður § 14 a orðað soleiðis:

"**§ 14 a.** Avgerðir tiknar av Skráseting Føroya sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina."

**§ 27**

Í løgtingslóg nr. 135 frá 18. oktober 2001 um postvirksemi, sum broytt við § 9 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008 og løgtingslóg nr. 42 frá 7. mai 2010, verður í § 20 a "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 28**

Í løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi, sum broytt við § 18 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 40 frá 13. mai 2013, løgtingslóg nr. 52 frá 4. mai 2017 og § 55 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 63 orðað soleiðis:

"**§ 63.** Avgerðir sambært hesi løgtingslóg ella reglum givnar við heimild í løgtingslógini kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Føroya Kærustovnur ger av, um kæran skal hava steðgandi virknað."

**§ 29**

Í løgtingslóg nr. 40 frá 23. apríl 1999 um djóralæknavirksemi v.m., sum broytt við § 14 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verður í § 32, 2. pkt. "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 30**

Í løgtingslóg um ferðslu sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 179 frá 17. desember 2020, verður í § 64 m, stk. 1 og 2 "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 31**

Í løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir, sum broytt við løgtingslóg nr. 111 frá 17. november 1982, løgtingslóg nr. 167 frá 21. desember 2001 og § 16 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verður í § 7 a "Vinnukærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 32**

Í løgtingslóg nr. 43 frá 22. mai 1969 um vápn o.a., sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 12. mai 1980, løgtingslóg nr. 81 frá 22. mai 2015, § 40 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og løgtingslóg nr. 158 frá 20. november 2020, verður í § 3 h, stk 3 "eina kærunevnd" broytt til: "Føroya Kærustovn".

*Skuldarumskipanarmál*

**§ 33**

Í løgtingslóg nr. 29 frá 8. apríl 2005 um umskipan av landsskatta-, mvg- og tollskuld v.m. hjá fólki (Skuldarumskipanarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 og løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993, verður § 8 orðað soleiðis:

"**§ 8.** Føroya Kærustovnur viðger og tekur avgerðir sambært hesi løgtingslóg.
*Stk. 2.* Føroya Kærustovnur hevur heimild at útvega sær neyðugar upplýsingar um fíggjarstøðuna hjá umsøkjara og annars upplýsingar, ið eru neyðugar fyri viðgerðina av málinum.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um beinleiðis atgongd til upplýsingarnar sambært stk. 2.
*Stk. 4.* Avgerðir sambært hesi løgtingslóg kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarmyndugleika."

**§ 34**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2022. Samstundis fer løgtingslóg nr. 110 frá 13. desember 2006 um kærunevnd í

lendismálum og løgtingslóg nr. 17 frá 8.
mai 2008 um Vinnukærunevnd úr gildi.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Løgtingið samtykti í november 2021 uppskot til løgtingslóg um Føroya Kærustovn. Sí LM-007/2021.

Endamálið við *løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn* er at skipa Kærustovnin sum sjálvstøðugan og óheftan myndugleika. Hetta hevur við sær, at 11 kærunevndir og aðrar nevndir, sum Føroya Kærustovnur er skrivstova hjá, verða tiknar av yvir eitt tíðarskeið uppá 2 ár, og at ein kærunevnd, Fjølmiðlanevndin, verður flutt.

Heimildirnar hjá nevndunum skulu, so hvørt sum nevndirnar verða tiknar av, flytast til Kærustovnin. Tað merkir, at Kærustovnurin frameftir skal viðgera og taka avgerð í kærumálum, sum tær átta kærunevndirnar hava, og at Kærustovnurin eisini skal taka avgerð í teimum málum, sum tær tríggjar avgerðarnevndirnar hava.

Talan er um hesar nevndirnar:

- Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum.
- Skatta- og avgjaldskærunevndina.
- Kærunevndina hjá Studna.
- Kærunevndina í lendismálum.
- Vinnukærunevndina.
- Kærunevndina hjá Barsilsskipanini.
- Kærunevndina hjá ALS.
- Psykiatrisku Sjuklingakærunevndina.
- Skuldarumskipanarnevndina.
- Høvuðsbarnaverndarnevndin.
- Tvingsilsnevndina.

Sambært *løgtingslóg nr. ?? frá 10. desember 2021 um broyting í ymsum løgtingslógum í samband við umskipan av Føroya Kærustovni* vórðu Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndin og Kærunevndin hjá Studna tiknar av og virkisøkið flutt til Føroyar Kærustovn tann 1. januar 2022.

Sambært § 16, stk. 2 í *løgtingslóg um Føroya Kærustovn* verða hesar nevndir tiknar av og virkisøkið flutt til Føroyar Kærustovn tann 1. juli 2022:

1) Kærunevndina í lendismálum.
2) Vinnukærunevndina.

3) Skuldarumskipanarnevndin

Í hesum sambandi er tað neyðugt at gera broytingar í teimum lógunum, sum hesar tríggjar nevndirnar fevna um. Talan er um lóggávu á málsøkinum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum og Løgmansskrivstovuni.

Avtalað er við stjórnarráðini, at Løgmansskrivstovan ger hesar fylgilógarbroytingarnar í samband við umskipan av Føroya Kærustovni, so tær verða gjørdar eftir sama leisti.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Sambært galdandi lóggávu eru Kærunevndin í lendismálum og Vinnukærunevndin kærumyndugleiki í teimum málum, har landsstýrismenninir hava lagt sín kærumyndugleika til hesar nevndirnar, meðan Skuldarumskipanarnevndin tekur avgerð í umsóknum, sum verða sendar til nevndina.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Talan er um fylgilógarbroytingar í samband við umskipan av Føroya Kærustovni. Endamálið við uppskotinum er at flyta tær heimildir, sum hesar nevndir í dag hava, til Kærustovnin. Tað merkir, at Kærustovnurin frameftir skal viðgera og taka avgerð í kærumálum og málum, sum hoyra til hesar tríggjar nevndirnar.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Í 33 ymiskum løgtingslógum og lógum verður skotið um at broyta ásetingar í hesum lógunum soleiðis, at har sum tað í dag er ásett at kærast kann antin Kærunevndina í lendismálum ella Vinnukærunevndina, skal tað frameftir vísast til Føroya Kærustovn sum kærumyndugleika. Avgerðarmyndugleikin sambært Skuldarumskipanarlógini verður eisini fluttur til Føroya Kærustovn.

Tær 33 lógirnar eru á málsøkjunum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og Fíggjar-málaráðnum. Í klombrum verður víst til greinina í lógaruppskotinum, sum broytir lógina.

*Á málsøkinum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum:*

*Lendismál*
Løgtingslóg nr. 60 frá 15. mai 2012 um at byggja bygningar o.a. (§ 1)
Løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir (§ 2)
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m. (§ 3)
Løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing (§ 4)
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir (§ 5)
Lov nr. 69 af 7. maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne (§ 6)

*Vinnumál*
Løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2020 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (§ 7)
Løgtingslóg nr. 49 frá 30. apríl 2018 um djóravælferð (Djóravælferðarlógin) (§ 8)
Løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2015 um fjarskifti (§ 9)

Løgtingslóg nr. 21 frá 16. mars 2012 um havnaloðsing (§ 10)
Løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin) (§ 11)
Løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (Grannskoðaralógin) (§ 12)
Løgtingslóg nr. 83 frá 25. mai 2009 um aling av fiski v.m. (§ 13)
Løgtingslóg nr. 20 frá 8. mai 2008 um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum (§ 14)
Løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi (§ 15)
Løgtingslóg nr. 28 frá 30. apríl 2007 um spreingievni og spreingiarbeiði v.m. (§ 16)
Løgtingslóg nr. 35 frá 3. mai 2007 um kapping (§ 17)
Løgtingslóg nr. 46 frá 15. mai 2007 um kavaravinnu og kavaraútgerð (§ 18)
Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (§ 19)
Anordning nr. 1113 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde (§ 20)
Anordning nr. 1114 frá 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin) (§ 21)
Løgtingslóg nr. 103 frá 20. november 2007 um ognartøku og avhendan til flogferðsluendamál (§ 22)
Anordning nr. 1355 frá 9. desember 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven (Ársroknskaparlógin) (§ 23)
Løgtingslóg nr. 58 frá 22. apríl 2003 um innflutning og hald av vandamiklum djórum o.ø. (§ 24)
Løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001 um djórasjúkur (§ 25)
Løgtingslóg nr. 64 frá 27. apríl 2001 um vinnu (§ 26)
Løgtingslóg nr. 135 frá 18. oktober 2001 um postvirksemi (§ 27)
Løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi (§ 28)
Løgtingslóg nr. 40 frá 23. apríl 1999 um djóralæknavirksemi v.m. (§ 29)

*Á málsøkinum hjá Fíggjarmálaráðnum:*

*Vinnumál*
Løgtingslóg um ferðslu sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu (§ 30)
Løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir (§ 31)

*Skuldarupskipanarmál*
Løgtingslóg nr. 29 frá 8. apríl 2005 um umskipan av landsskatta-, mvg- og tollskuld v.m. hjá fólki (§ 33)

*Á málsøkinum hjá Løgmansskrivstovuni:*

*Vinnumál*
Løgtingslóg nr. 43 frá 22. mai 1969 um vápn v.m. (§ 32)

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá:

- Fíggjarmálaráðnum
- Umhvørvis- og vinnumálaráðnum
- Føroya Kærustovni

Ummæli kom frá ....

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Tó so at fyri teir myndugleikar, sum umsita lógirnar, og fyri onnur, verður rættarstøðan greiðari, tá ið neyðugu fylgibroytingarnar verða gjørdar, soleiðis at veruliga rættarstøðan framgongur av tí einstøku lógini.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagskapir. Tó so at fyri tey, sum brúka og umsita lógirnar, og fyri onnur, verður arbeiðið lættari, tá ið veruliga rættarstøðan framgongur av tí einstøku lógini.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á hesum økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, sum Føroyar hava skyldu at fylgja. Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar grundað á skyldur í millumtjóðasáttmála.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er ikki í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS, ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar grundað á skyldur í millumtjóðasáttmála.

### 2.9. Markaforðingar
Tað eru ongar kendar markaforðingar, og lógaruppskotið elvir ikki til nýggjar markaforðingar, av tí at talan er um fylgibroytingar í samband við umskipan av Føroya Kærustovni, sí LM-007/2021.

### 1.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki nýggjar skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ongar heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Nei.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**
**Til §§ 1-6**
Hetta er lóggáva á málsøkinum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Hesar 6 lógirnar áseta reglur um ymisk *lendismál*, so sum at byggja bygningar, eigaríbúðir, matrikulering og sundurbýti, tinglýsing, býarskipanir og byggisamtyktir og ognartøka til at gera veg, havnir, lendingar og skúlar.

Ásett verður, at avgerðir sambært hesum lógunum kunnu kærast til Føroya Kærustovn í staðin fyri til kærunevndin í lendismálum.

Talan er um avgerðir hjá kommunalum myndugleikum og hjá Umhvørvisstovuni.

**Til §§ 7-29**
Hetta er eisini lóggáva á málsøkinum hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Hesar 23 lógirnar áseta reglur um sera ymisk *vinnumál*, so sum fyribyrgjandi tiltøk móti hvítvaski, um vinnu, vinnufeløg, grannskoðarar, vinnurekandi grunnar, vinnufyritøkulóg, ársroknskaparlóg, skylda arbeiðsgevarans í setanarviðurskiftunum, arbeiðsumhvørvi, tryggingarviðurskifti, fjarskifti, kapping, postvirksemi, havnaloðsing, spreingievni, kavaravinnu, djóravælferð, aling av fiski, vandamikil djór, djórasjúkur, djóralæknavirksemi, ravmagn og ognartøka til flogferðsluendamál.

Ásett verður, at avgerðir sambært hesum lógunum kunnu kærast til Føroya Kærustovn í staðin fyri til Vinnukærunevndina.

Talan um avgerðir hjá ymiskum myndugleikum so sum Tryggingareftirlitinum, Fjarskiftiseftirlitinum, Kappingareftirlitinum, Posteftirlitinum, Elveitingareftirlitinum, Landsverk, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Akstovuni og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum,

**Til §§ 30, 31 og 33**
Hetta er lóggáva á málsøkinum hjá Fíggjarmálaráðnum. Tvær av lógunum eru *vinnumál* - tað eru ferðslulógin og lógin um landsvegir. Talan um avgerðir hjá Akstovuni og Landsverk. Ásett verður, at avgerðir sambært hesum løgtingslógum kunnu kærast til Føroya Kærustovn í staðin fyri til Vinnukærunevndina.

Triðja lógin er skuldarumskipanarlógin. Ásett verður at avgerð verður tikin av Føroya Kærustovni í staðin fyri Skuldarumskipanarnevndini.

**Til §§ 32**
Vápnalógin er lóggáva á málsøkinum hjá Løgmansskrivstovuni. Ásett verður, at avgerðir kunnu kærast til Føroya Kærustovn í staðin fyri til Vinnukærunevndina.

**Til § 34**
Gildiskoman er sett til 1. juli 2022, tá ið Kærunevndin í lendismálum, Vinnukærunevndin og Skuldarumskipanarnevndin sambært § 16, stk. 2 í *løgtingslóg um Føroya Kærustovn* verða tiknar av.

Samstundis fer løgtingslóg nr. 110 frá 13. desember 2006 um kærunevnd í lendismálum og løgtingslóg nr. 17 frá 8. mai 2008 um Vinnukærunevnd úr gildi. Við hesum verða hesar kærunevndirnar tiknar av 1. juli 2022.

Sambært § 18, stk. 2 í *løgtingslóg um Føroya Kærustovn* er ásett, at kæra send til kærunevnd, og sum ikki er avgreidd, tá ið viðkomandi kærunevnd verður tikin av, viðger og avgreiðir Føroya Kærustovnur eftir reglunum í løgtingslóg um Føroya Kærustovn.

Løgmansskrivstovan, xx. xx  2021

**Bárður á Steig Nielsen**
løgmaður

/ John Rajani

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum.
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Fíggjarmálaráðnum.
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Føroya Kærustovni